Tíðindaskriv frá FFU:

## Føroyskir fiskimenn uttanlands

Felagið hevði aðalfund hin 28. desember 2000 í Norðurlandahúsinum, har nevndarval var.

Í nevndina kom Jógvan Fagraklett Kollafjørð, og úr nevndini fór Bennie Højgaard í Fuglafirði. Hesir eru valdir fyri teir sum sigla í Danmark.

Fyri teir, sum sigla í Kanada: Birgir Lützen, Tórshavn, afturvaldur.

Fyri Norra: Høgni Waag Høgnesen, Toftir, afturvaldur.

Á fundinum varð Føroya Sparikassi og greiddi frá Luta- og Kapitalpension, og umboð frá Skatta- og Fíggjarmálastýrinum og greiddi frá rættindum í skattinum, har serligur dentur var á samdøgursfrádráttinum. Har kom fram, at allir ikki vóru greiðir yvir henda, tí tað frá deildum Toll- & Skatt hava givið okkara limum upplýsingar, sum ikki samsvara við tað, ið fekst út av á fundinum.

Tí kunna limir okkara kanna eftir, um teir hava fingið henda frádrátt, um ikki, so kunna teir fáa hetta í rættlag fyri seinastu fimm árini við at venda sær til Toll- & Skatt í sínum øki.

Á fundinum var eitt uppskot lagt fram av einum faldara til felagið.

Felagið arbeiðir framvegis við at útvega limun sínum samlagstryggjing.

Felagið er nærum komið á mál við samstarvsavtalu fyri limirnar við Formula fo, har teir kunna koma á skeið ella taka seg saman um skeið, eins og teir fáa ein serprís við keyp av telduútbúnaði.

Eisini eru fleiri avtalur um ymiskt við at vera komnar undir land bæði her á landið og í útlandinum.

VIÐMERKINGAR:

# Nationalisma, eitt virus



**Heri Mohr**

Eldri og gomul øtast og ræðast alt meira og meira ta ágangandi og óføroysku indoktrinering, sum í longri tíð og áhaldandi so náðileyst hevur leikað í, tað veri seg í skrift og talu. Hetta hevur sum vituligt er borið við sær, at stórur ótryggleiki valdar millum fólk á hesum klettum, og tey eru sum sagt ikki fá, ið ræðast tendentiøsa tíðindaflutningin og ódámliga skrivingarlagið, har rithøvundar og annað gott fólk ikki smæðist burtur.

Nú, stutt áðrenn anno Domini MM legði árarnar inn, deklameraði ein av teimum nakað, sum mest av øllum líktist trárjáttan, Credo, og sum siður er, eiga fólk at standa uppi, meðan slíkar játtanir verða lisnar.

Ein annar hevur um somu tíð við marathongrein sligið fast við 7 tumma spíkarum, at Danmark, danskarar hava jagstrað Føroyar og føroyingar í óminni. Nógvir av forherðingunum hava sostatt ligið undir grønu torvu í øldir.

Løgið: Er tað ikki haðani, vit føroyingar hava sogið evropeiskan kultur? Bókmentir, list, musikk og humanismu við tí stóru veking, fleiri av okkara bestu monnum nomu á háskúlum, millum aðrar kunnu vit nevna Askov og Vallekilde.

Skrivingin og orðalagið á parnasinum minnir okkum um fjaðrarnar og tær skrukkandi hønurnar á vaglinum í høsnarhúsinum hjá H. C. Andersen.

»O, Freunde, nicht diese Töne«.

Í 1861 kom út bókin »Fox-Expeditionen i Aaret 1860 over Færøerne, Island og Grønland«. Bókin er skrivað/prentað við gotiskari skrift, hon er áhugaverd og spennandi at lesa. Um Føroyar og føroyingar er millum annað skrivað:

»Om Eftermiddagen passered vi Kaldbaksfjord og ankom om Aftenen til Kollefjord, ved hvis Bund vi fandt den første Bolig, siden vi havde forladt Thorshavn, og da vi syntes at have udført et godt Dagarbeide, besluttede vi at søge Natteleie der. Vi havde en meget brat Nedstigning fra 1143 Fods Høide. Husets Eier, Bonden Ole Christian Dam (1798-1886, giftur við Anna Christine Mohr 1803-1874) i Øre-Enge, modtog os med megen Gæstfrihed. Han syntes at være en velstaaende Mand, der holdt sine sager i god Orden. Beskrivelser af Færøerne vrimle af, saae vi her intet til. Vi fandt tværtimod det modsatte. Hele Husets Ydre var et mønster paa Orden og Reenlighed, og »Salen«, som os blev anviist, udmærkede sig ved et smukt, hvidtskuret Gulv og et særdeles hyggeligt Udseende… Hvor kan man andet end holde af en saa god, sund natur, en saa opvakt Fjeldboer, en saa kjæk Søgut! Hans hele væsen tiltaler, og hans hurtige Fatteevne gjør hans Omgang behagelig… Færingen besidder en udviklet selvstændig Karakter og et frit, aabent blik paa Livet. I Omgang er han beleven som kun faa Bønder i Verden… Kl. 2 traf vi sammen med Shaffner i det omtalte Huus hos Bonden Jens Christian Jacobsen, der havde en stor Familie: 4 Døttre og 4 Sønner. Det var Søndag og hele Familien var forsamlet, inclusive Børnebørn. De havde netop som vi ankom tilendebragt deres Huusandagt, i hvilken Shaffner havde deeltaget. Han forsikrede, at han, skjønt han ikke havde forstaaet Ordene, dog havde følt sig meget andægtig stemt; og hans Udseende bekræftede hans Ord, da han bevæget beskrev os den ærværdige Alvor, hvormed den gamle Bedstefader havde ledet Gudstjenester, og den Andagt, med hvilken Alle: Kvinder, Mænd og Børn, havde fulgt Handlinge.

I Qvalvig toge vi ind til Bonden John Johansen hvis Huus endog overgik hvad vi hidtil havde seet, men som jeg ikke nærmere skal berøre, af Frygt for at blive beskyldt for: ikke at ville see Ureenlighed. Vi blev her modtagne med den samme gæstfrie Venlighed, som overalt udmærker Færingen…«

Hetta var so eitt lítið brot úr áðurnevndu bók, sum Premierlieutenant i Infanteriet Th. Beilau skrivaði fyri 140 árum síðan.

…men í russiskari roulettu – og serføroyskari – valda aðrar kenslur og aðrir tónar.

# Nýggjárstoskurin

**Sólmundur Joensen**

*Teir stóru toskarnir*

*Desember 2000*

Toskar í hópatali á Toskabankanum, stórir og smáir, tjúkkir og feitir og slánar. Frælsir teir svimja higar og hagar, yvir dalar og fjøll, yvir heyg og hól, niðan og oman líðir, innar í gjáir og glopur, toskastimar á ferð so langt eyga sær. Hatta toskaríkið er eitt stórt ríki, jú sanniliga ein sannur litfagur toskaaldingarður.

Í stóru og stásiligu kongsborgini í hásæti toskakongurin og toskadrotningin sita í mekt og mæti. Tey eta, drekka og dansa, so har líður ongin nakra neyð, hvørki so ella so, og toskakongurin skrivar undir allar tær mongu toskalógirnar, ið toskaborgararnir skulu halda, og hesar toskalógir eru so snildiliga orðarðar, at bert teir stóru toskarnir skilja tær, og kunnu reika um fríir og frælsir, uttan at nakað rínur við teir. Teir stóru toskarnir hava lært á víðagitnum lærustovnum vestan hav, hvussu teir skulu hvessa tennirnar fyri á tann hátt at skræða trol, nótir, gørn sundur og soleiðis sleppa snikkaleysir út aftur, og kunnu frælsir eika um á verðaldarhøvunum, meðan teir smáu altíð eru í vanda, teir hava ongar møguleikar at sleppa gjøgnum meskarnar, men verða fangaðir, og enda sínar dagar í svongum mannabúkum. Í hesum toskaríkinum valdar altíð friður, og øll liva saman í sátt og semju.

Í útjaðaranum á Toskabankanum í einum tryggum, friðarligum umhvørvi býr ein stór toskafamilja, toskapápin, toskamamma, toskaabbar og toska ommur og ein rúgva av toskabørnum, og tey búgva í einari glæsiligari toskaborg.

Toskapápin reikar víða um, men kemur altíð heimaftur til toskafamiljuna, men hendan samvitskufulla toskamamman passar børnini væl og virðiliga, sum ein dugnalig toskamamma jú skal gera, frá tí tey koma í reiðrið, til tey verða floygd og flyta heimanifrá, jú sanniliga eitt trygt og læruríkt heimaumhvørvi.

Toskafamiljan ger altíð nógv burturúr høgtíðunum, ein sannur høgtíðardámur liggur yvir toskaborgini – reinleikin geislar langa leið, men í kjalarvørrinum er altíð eitt stórt, rúgvismikið upptak. Toskapápin kemur altíð heim til jólaaftan, og hevur eina rúgvu av jólagávum við sær, hetta plagdi pápi hansara altíð at gera, so hetta er, sum so mangt annað, ættarbregði.

Tá ið øll eru mett og væl sett og jólagávurnar pakkaðar upp og toskaarnir hava sungið toskasangirnar kring jóltræið, ið stendur í miðjum gildisskála – høgt til loft og vítt til veggja, tá seta øll seg kring toskapápan og lýða á, meðan hann greiðir frá øllum tí fjølbroytta, spennandi og vandamikla, hann hevur upplivað á sínum mongu ferðum víða um á verðaldarhøvunum. Hann hevur verið í Barentshavinum, New Foundlandi, hevur vitja norskar toskar, grønlendskar toskar, íslendskar toskar, amerikanskar toskar.

Allar hesar frásøgnir líka teimum øllum sera væl at hoyra á Toskabankanum. Tær somu sogurnar ár aftaná ár. Jú sanniliga hevur eydnan verið við toskapápanum. Men tað hevur mangan verið um reppið, at hann hevur verðið fagnaður bæði í gørnum, nótumm, trolum og á húki, men ígjøgnum meskarnar slepp hann altíð, og kundi síðan svimja fríur og frælsur út aftur í víðu verð.

Men allar hesar snildir hevur hann lært frá toskaabbanum, sum nú sat og nikkaði til hvørt orð, ið toskapápin segði, og smíltist í skeggi. Toskaabbin kundi nú minnast tann lærdóm, hann hevði nomið sær á tí besta listilærda skúlanum vestan hav, og allar hansara snildiligu royndir hevði hann lært toskasonin.

Eisini hevði toskapápin lært mangar snildir av teim mongu fremmandutoskunum, hann hevði nomið sær kunnleika frá. Toskapápin hevur sanniliga gingið í tí góða listilærda skúlanum, ið veitir kunnleika og lærdóm, soleiðis at framskygdir toskar ongantíð verða fangaðir, hvørki í gørnum, trolum, nótum ella á húki – teir koma at búleikast í friði og náðum og geva hendan teirra listilærda kunnleika og snildir víðari til toskabørn síni, og tey, ið vilja taka ímóti snildum ráðum, verða eins og toskaabbin, listilærd og snild sum slangir.

Hesir stóru toskarnir skilja hvønn annan, tosa sama toskamál, men sær lærdóm á teim bestu lærustovnum bæði vestan hav og nú eisini á Toskabankanum, ið er vorðin ein fyrimynd fyri teir stóru toskarnar, hesin lærustovnur er vorðin víðakendur, sum toskaabbin setti á stovn, og sum toskapápin gekk í og nú synir hansara ganga í – verða einaferð til stórar, snildir og listilærdar toskar – koma at skilja og tosa hetta listilærda og snildiliga altjóða stórtoskamálið.

Toskapápin var í góðum hýri, og hendan jólaveitslan vardi í 14 dagar, men tá mátti hann út aftur í stóru verð, og øll søgdu hesum háttvirda stórtoskinum farvæl! Hann reikaði víða um. Men ein dagin var hesin listilærdi toskurin so gáloysin, bert stórtoskadreymar mólu í heysinum á honum, at hann fløkti seg inn í eitt trol, hevði gloymt at hvessa tennirnar, og bleiv fastur, og áðrenn hann visti av nøkrum, lá hann á tí stálkalda dekkinum. Spraklaði nakrar ferðir, og so lá hann púra stillur, stardi upp í tað óendaliga bláa loftrúmið og hugsaði: “nú eri eg eins og teir smáu toskarnir altíð eru og verða,” og gav upp andan.

Nú hongur hesin stóri toskurin stívur á veggi á Náttúrugripasavninum í Havn og starir við stórum toskaeygum at skúlabørnunum, ið ganga framvið og peika. Men úti á teim víðu verðaldarhøvunum reika stórir toskar enn sum áður, sum óivað ongantíð verða fangaðir. Jólini farin afturum, og eitt nýtt stórtoskaár stendur fyri durum, fragdarrómur frá stórtoskafamiljuni hoyrist um allar geilar. Her endar søgan um teir stóru toskarnar á Toskagrynnuni.




DAGFØR
TEG
Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.
Sosialurin



Í býin Í býin Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin

Dansur verður í vikuskiftinum
ALLIR FÓTBÓLTSDYSTIR Á STÓRSKÝGGJA Í KAGGANUM
Kaggin
Kaggin
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

fk Mat-seðilin
Hósdagin 4. jan.:
Lambafrikasé
Fríggjadagin 5. jan.:
Enskur búffur
Leygardagin 6. jan.:
Culottesteik
Mánadagin 8. jan.:
Gjørd hara
Týsdagin 9. jan.:
Gordon Bleu
Mikudagin 10. jan.:
Saltkjøt
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið við plátuvendara
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLIARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT
Á SKY


www.sosialurin.fo

Eysturoy

Góður trettanda-kvøldsdansur
Á STRONDUM

Góður trettandakvøldsdansur verður á Strondum leygarkvøldið 6.jan har Audio spælir góðan dansitónleik.
Matstovan verður opin
STRÁLAN


Vilja tygum við í

*Í býin* - **hvønn hósdag**

Ynskja tygum at lýsa í teiginum ***í býin***, so fyllið út henda lepan og sendið hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur